# Grótkastið í Skálavík sjunkar

**Grótkastið, sum verjir bátahylin í Skálavík er í stødum lækkað upp móti tveimum metrum. Undirlagið skríður undan, og tað ger innsiglingina keðiliga hjá óstaðkendum fólki**

HAVNARVIÐURSKIFTI
*Edvard Joensen*

Í stødum er grótkastið í Skálavík lækkað við upp móti tveimum metrum, síðan tað varð lagt út seinast í sjeytiárunum. Støðið skríður undan, og botnurin gerst breiðari. Tað ger aftur, at tað kann vera keðiligt hjá óstaðkendum fólki at sigla inn og út úr bátahylinum, sigur virkandi borgarstjórin í Skálavík.

– Grótkastið treingir til ábøtur, men tær verða helst so kostnaðarmiklar, at kommunan orkar ikki at gera tær, sigur Palli Olsen, varaborgarstjóri í Skálavík. Hann er í løtuni virkandi borgarstjóri, tí valdi borgarstjórin er burturstaddur.

Tað er soleiðis, greiðir hann frá, at botnurin er breiðkaður, tí tað skríður undan. Grót er soleiðis komið út móti innsiglingini, har tað ikki var frá byrjan.

– Tað er ikki tí, at tað ger nakað hjá teimum, sum vita, hvussu út sær, sigur Palli Olsen. Men kemur fremmant fólk, kunnu tey fáa trupulleikar, um heilt illa vil til.

Skálavíkar Kommuna hevur havt ætlanir um at gera nakað við grótkastið, men hevur ikki pengar, sum er, sigur virkandi borgarstjórin. Fyri árum síðan varð farið at savna saman av stuðulsjáttan, sum fingin varð, men sum ikki rakk nóg lagt við einari játtan.

Men kreppan fór við øllum, sigur Palli Olsen. Allir slíkir grunnar vórðu avtiknir, og peningurin hvarv.

– Slíkar játtanir eru eisini smáar, og íløgumark er eisini, so her gerst einki, sum er, sigur hann. Tað fæst ikki meira enn fyri at flyta maskinurnar aftur og fram, sum hann tekur til.

Skálavíkar Kommuna hevur eisini brúkt pengar uppi á landi seinnu árini, vísir Palli Olsen á. Til dømis eru lagdar kloakkir, og vegirnir eru umvældir og asfalteraðir, eins og nýtt vatnreinsiverk eisini er gjørt. Pengar hava tí ikki eisini verið til at gera verjugarðin fyri, sigur hann.

Tað verður ikki róð út við stórum bátum úr Skálavík. Eini 15 tons man vera tað mesta, bátarnir kunnu vera, sum liggja her, heldur Palli Olsen. Einki serligt hevur verið av vetrarútróðri seinnu árini heldur, men nú er bátur komin aftur til bygdina, og teir hava drivið tað rættiliga í heyst, sigur hann. So væntandi kann, at lív verður í aftur í bátahylinum eisini.

Skálavík er brimpláss á eysturættum. Serliga landnyrðingurin er ringur. Men síðan grótkastið kom, hava bátar kunnað ligið í hylinum alt árið, sigur Palli Olsen. Tað er tó ikki so, at hylurin hevur kunnað verið fullur av bátum, men nakrir hava altíð kunnað ligið.

Eisini hevur verið ávís ferðsla til Skálavíkar við smærri bátum. Serliga um summarið. Tað kemst av, at beding er í Skálavík, sum tekur smærri deksbátar og stórar installeringar upp, har teir so kunnu reinsast og gerast við. Hon verður brúkt av bátum úr allari oynni, sigur virkandi borgarstjórin í Skálavík.



*Grótkastið, sum verjir fyri bátahylinum í Skálavík, er frið at sjunka. Í stødum er tað lækkað einar tveir metrar, síðan tað var lagt út seinast í sjeytiárunum*

*Mynd: Oskar Oskarsson*



# Tiltøk í februar

**Í februar vera, sum vant, ymisk tiltøk runt í Havnini. Millum annað kemur eitt sirkus til Føroya, filmar vera frumsýndir og DJ-show byrja aftur**

TILTØK
*Annika S. Olsen*

Norðurlandahúsið er, sum vant, karmur um nógv tiltøk. 3 februar varð virðislønti finski filmurin »Maðurin við ongari fortíð« sýndur har, og vikuskiftið 14. til 16. februar verður norðurlendsk barnatalvkapping.

Í ítróttarhøllini á Hálsi kemur norðurlendska sirkusið, Cirkus Arena at sýna fram. Hetta verður sunnudagin 9. februar kl. 16.00. 7. februar verður klovnurin Pjerrot úr sama sirkusi á Torginum í SMS, har hann fer at vísa fram kynstur síni.

### Konsertir og tónleikur

Ymsar konsertir vera eisini í Norðurlandahúsinum. Havnar Hornorkestur verður 100 ár í ár, og í tí sambandinum verður heiðurskonsert, leygardagin 8. februar, har vitjan verður av heimskenda trompetspælaranum John Wallace úr Skotlandi.

12. februar fara trý úr Aldubárini at spæla í Klingruni, og 22. februar verður skipað fyri sangi og tónleiki við norðurlendskum kvæði.

### Í býin

Cleopatra, Manhattan, Platform og Club 20 skipa eisini hendan mánaðan fyri dansi, diskoteki og livandi tónleiki. Café Natúr fer í februar at hava tvær vitjanir, Doc fer at spæla fýra ferðir, fyrru helvt av mánaðanum og tónleikarin Chris McCarter framførir fýra ferðir í seinnu helvt av mánaðanum.

Fyri tey ungu undir 18 ár, fer DJ-show at byrja aftur. Tann 8. februar verður DJ-show.

Annars vera, sum vanligt er, eisini barna- og ungdómsdiskotek fríggjakvøld í Margarinfabrikkini.

Havnar Bio fer at hava tríggjar Frumsýningar í februar. 7. februar verða tveir filmar frumsýndir, »Junglebogen 2« og »The Ring«. 21. februar verður filmurin »Two Weeks Notice« frumsýndur.

# DJ-Show við strangari eftirliti

**Leygardagin 8. februar byrja DJ-Showini aftur, men nú verður tað eitt sindur strangari. Umsjónarfólk og náttaravnar fara at vera uttanfyri, so at grannarnir ikki verða órógvaðir**

DJ-SHOW
*Theresa S. Krogager*

Eftir jól steðgaðu DJ-showini. Tey vórðu hildin í Badmintonhøllini í Havn. Orsøkin til at tað steðgaði var, at nærmastu grannar til Badmintonhøllina klagaðu um ov nógvan larm. Eftir at grannarnir høvdu klagað í langa tíð um hetta, gjørdi býráðið av, at DJ-showini skuldu enda kl. 2 ístaðin fyri kl. 3.30. Hetta dámdi teimum ungu einki, so tað vóru ikki nógv, ið fóru.

Annar jóladagur var so síðstu ferð at DJ-Show var. Síðan tá hava tey ungu millum 14 og 18 ár ikki havt nakað stað at vera í um vikuskiftini. Ungdómurin gramdi seg nógv um hetta, og til endans fóru tveir dreingir, Tummas Hans Rubeksen og Rói Bjarnason Poulsen, at savna undirskriftir. Hetta gekk sera væl, teir fingu umleið 700 undirskritir.

Og nú fara DJ-Show aftur í gongd.

### Umsjónarfólk

Borgarstjórin í Havn, Jan Christiansen, sigur at allir partar hava verið á fundi í málinum um henda trupulleika. Grannar, løgregla og tey sum standa fyri DJ-showunum. So øll sjónarmið vórðu hoyrd. Tey blivu samd um, at Dj-showini skulu verða 3. hvørt vikuskifti líka til heystar, og enda kl. 3.30 sum vanligt. Tey ætlaðu eisini at seta 15 ára aldursmark á, men av tí at Margarinfabrikkin hevur eitt aldursmark upp til 13 ár, tað vil siga at tey, sum eru 14 ár, ikki sleppa inn. Fyri at tey 14 ára gomlu eisini skulu hava eitt stað at vera er aldursmarki á DJ-Showinum 14 ár.

Fyri at grannarnir ikki skulu verða órógvaðir meir enn neyðugt hava teir, ið standa fyri tónleikinum, sett filtur á bassin, so at tað ikki hoyrist so væl út.

Uttan fyri fara umsjónarfólk, sum samstarva við náttarravnarnar at vera. Hesi umsjónarfólk fara at ganga uttan fyri høllina og ansa eftir, at tey ungu ikki larma ov nógv og gera herverk.

### Lova nýggjum framat

Fleiri ung, sum sosialurin hevur tosa við, halda at tað hevði tað verið eitt gott hugskot, at latið teir nýggju bólkarnir framført á DJ-Showum. Hetta hevði eisini verið sera áhugavert bæði fyri bólkarnir og áhoyrarar. Hetta hevði eisini givið møguleika fyri bólkarnar, at víst teirra tónleik, og tað hevði verið ógvuliga áhugavert, at hoyrt nakað nýtt í staðin fyri altíð teir somu amerikonsku bólkarnar. Ein bólkur hevði kunnað framført helvtina av kvøldinum, og hina helvtina kundi man hoyrt disco tónleikin, sum man vanliga hoyrur.

Ein kann gleða seg til føstulávintskonsertina 1. mars, sum eisini fara at hava fleiri bólkar frá Prix Føroyum, ið fara at spæla og undirhalda í Badmintonhøllini.

Betri tænasta til okkara vinnukundar.

- Øll vanlig eftirlit verða ókeypis næstu fýra árini ella upp til koyrdar 100.000 km., tað vil siga fyrstu koyrdar km. 25.000, 50.000, 75.000 og 100.000.
- Møguleiki skal verða fyri at fáa eftirlit, oljuskift og dekkskifti gjørt mikukvøld, soleiðis at bilurin er klárur aftur hósmorgun.
- 20% í avsláttri uppá allar eykalutir, dekkkeyp og oljuskift.
- Í samband við dekkskifti fáa tygum møguleika fyri at goyma reserva-dekkini á okkara nýggja dekkhotellið.

Ford

P/F Wenzel

Tað loysir seg at verða vinnukundi hjá okkum.

www.wenzel.fo, Akranesgøta 5, tlf. 354500.